


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 30 - 08 - 2012

# Borgarstjórar marknaðarføra Føroyar á oljumessu

Fýra kommunur og tríggir borgarstjórar hava hesi vikuna umboðað Føroyar á oljumessuni í Stavanger, Heðin Mortensen úr Tórshavn, Magnus Rasmussen úr Runavík og Kirstin Strøm Bech úr Vági. Haraftat eru umboð fyri Tvøroyarar kommunu eisini við á føroyska básinum í Stavanger. Tá stóru framsýningarhølini á oljumessuni ONS í Stavanger lata aftur seinnapartar, leita luttakarar inn í miðbýin og oman á bryggjuna, har fyritøkur og býir bjóða gestum inn í síni tjøld, til tess at røkja sambond í einum hugnaligum umhvørvi."? sigur Tórshavnar Kommuna í tíðindaskrivi og heldur fram - "Í tjaldinum hjá Tórshavnar og Runavíkar kommunu hava Kunningarstovan í Havn og Atlantic Airways kunningardiskar. Nógv fólk hava vitjað tjaldið og fingið góð ráð um Føroyar sum ferðamannaland. Serliga føroyski tónleikurin tykist at draga fólk, ið spáka eftir bryggjuni, inn at fregnast í føroyska tjaldinum. Í gjárkvøldið var tjaldið og økið frammanfyri fult av gestum. Ein altjóða dámur var yvir staðið, har m.a. føroyingar, amerikanarar og italienarar prátaðu og lurtaðu eftir tónleiki, ið Hallur Joensen og Jens Marni Hansen framførdu. Westward Ho er eisini komin til Stavanger og í gjár var stór móttøka umborð fyri oljufólki, politikarum oø." Mynd - Heðin Mortensen, Kirstin Strøm Bech og Magnus Rasmussen.